# Mjølnir og TB stóru vinnararnir

**TB og Mjølnir vunnu hvør síni fimm steyp á árligu flogbóltsgallaveitsluni leygarkvøldið. Ársins spælarar 2003/04 eru Gudrid Nolsøe og Bartal Eliasen**

FLOGBÓLTSGALLA
*Páll Holm Johannesen, pall@sosialurin.fo*



*Gudrid Nolsøe og Bartal Eliasen vóru leikararnir, sum fram um øll onnur vórðu kosin tey bestu*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Leygarkvøldið skipaði Flogbóltssamband Føroya fyri árligu galla-veitsluni, sum er endabresturin fyri kappingarárinum í vetur. Góð 200 fólk vóru savnað á Hotel Føroyum.

Flogbóltssambandið hevði lagt nógv fyri at fáa eitt so væleydnað kvøld sum gjørligt og tað eydnaðist eisini til fulnar. Hæddarpunktið á kvøldunum var, tá tað skuldi avdúkast, hvørjir flogbóltsleikarar vóru best í flogbóltsárinum, sum fór.

### Gudrid X 2

Hjá kvinnunum gjørdist steypavinnararnir av Tvøroyri stóru vinnararnir. Leikarar og venjari hjá TB vunnu í alt fimm steyp leygarkvøldið. Hetta kennist óivað fjálgt hjá tvørakvinnum, sum gjørdust just ov stuttar í kappingini um FM-heitið í ár.

Gudrid Nolsøe varð kosin ársins leikari og ársins áleypari. Ingun Midjord og Sólva Dimon gjørdust ávikavist ársins blokkleikari og ársins stjørnuskot. Venjarin hjá TB-kvinnunum í vetur, Virgar Djurhuus, varð valdur til ársins venjara í kvinnudeildini.

Veteranurin hjá Mjølnir, Marjun Kalsø, fekk heiðurin sum ársins hevari og liðfelagið hennara, Margit Joensen varð kosin til ársins verjuleikara.

Ársins útlendski leikari varð Nicolina Alter hjá Drátti.

### Bartal bestur

Leygardagurin má sigast at hava verið dagur í viku hjá fuglfirðinginum, Bartal Eliasen.

Seinnapartin leygardagin hevði Bartal avgerandi leiklut, tá hann stútaði fuglfirðingar víðari í kappingini um Løgmanssteypið. og seinni um kvøldið varð hann kosin til fremsta flogbóltsleikara farna vetur.

Liðfelagin hjá Bartali í ÍF, Odd Eliasen, fekk heiðurin sum ársins hevari. Sørvingarnir gjørdu eisini eitt veruligt hál leygarkvøldið. Jón Nielsen, Jóhan Petur av Stongum og Ólavur Jensen gjørdust ávikavist ársins áleypari, ársins verjuleikari og ársins stjørnuskot.

Føroyameistararnir úr Mjølni vóru heldur ikki við skerdan lut á gallaveitsluni. Veteranurin, Trúgvi Poulsen, varð kosin til ársins blokkleikari. Útlendingarnir hjá Mjølni, Stanislav Hristov og Vlademir Vasilev fingu ávikavist heiðurin sum ársins venjari og ársins útlendski leikari.

## Tey bestu

**Ársins áleypari (Steyp latið av Føroya Bjór)**

| | |
|---|---|
| Jón Nielsen | SÍ |
| Gudrid Nolsøe | TB |

**Ársins blokkleikari (Føroya Sparikassi)**

| | |
|---|---|
| Trygvi Poulsen | Mjølnir |
| Ingun Midjord | TB |

**Ársins verjuleikari (Tryggingarfelagið Føroyar)**

| | |
|---|---|
| Jóhan Petur á Stongum | SÍ |
| Margit Joensen | Mjølnir |

**Ársins hevari (Klaksvíkar Timburhandil)**

| | |
|---|---|
| Odd Eliasen | ÍF |
| Marjun Kalsø | Mjølnir |

**Ársins stjørnuskot (Føroya Shell)**

| | |
|---|---|
| Ólavur Jensen | SÍ |
| Sólvá Dimon | TB |

**Ársins leikari (Føroya Sparikassi)**

| | |
|---|---|
| Bartal Eliasen | ÍF |
| Gudrid Nolsøe | TB |

**Ársins venjari (Atlantic Airways)**

| | |
|---|---|
| Stanislav Hristov | Mjølnir |
| Virgar Djurhuus | TB |

**Ársins útlendski leikari (Kjølbro Heilsøla)**

| | |
|---|---|
| Vlademir Vasilev | Mjølnir |
| Nicolina Alter | Dráttur |

## So kom skipanin




Eitt sindur seinkað er hon nú loksins komin á gøtuna. Kappingarskipanin hja FSF fyr fótbóltslandskappingarnar í 2004.

Sær sjálvum so líkt, so inniheldur skipanin flestu av faktuellu upplýsingunum, sum eru hentar at hava, tá dystir v.m. skulu leggjast til rættis. Dystarskráin fyri ymsu deildirnar er ein sjálvfylgja, eins og yvirlit yvir kontaktpersónar í ymsu feløgunum, dómarar, fótbóltsumsiting v.m. er at síggja.

Skipanin fæst í flestu sølubúðunum kring landið, og kostar hon 30 krónur.
*-jm*



*Bestu flogbóltsleikararnir í landinum vórðu kosnir á stóru gallaveitsluni leygarkvøldið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Ungur havnarmaður til Dublin

**Tað gjørdist 14 ára gamli Martin Johannesen úr Havn, Martin Johannesen úr Havn, sum vann fótbóltsferðina til Dublin**

FÓTBÓLTSFERÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í samband við útgávuna av árliga fótbóltsblaðnum hjá Sosialinum, var aftur í ár skipað fyri kapping, har til bar at vinna eina fótbóltsferð.

Atlantic Airways fer uttan iva at flyta hópin av fótbóltshugaðum føroyingum til Dublin, tá Føroyar í heyst skulu spæla fótbóltsdyst her, og flogfelagið legði alt fyri eitt tvey av plássunum av, soleiðis at nakað skuldi vera til vinnaran av kappingini.

### Puslispælið gekk upp

Kappingin, sum talan var, var at savna saman eitt puslispæl, sum at enda skuldi vísa eina mynd av HB-liðskiparanum, Rúna Nolsøe. Sjálv plátan til hetta var at finna í fótbóltsblaðnum, meðan teir 15 puntarnir í puslispælinum so vóru at finna í Sosialinum seinastu tríggjar vikurnar.

Men tað var nú ikki bara sum at siga tað, at fáa hetta vælsignaða puslispæl at ganga upp. Tá brikkurin við 15-talinum á varð prentaður her í blaðnum, sótu tey flestu framvegis bara við 14 brikkum, men mistakið varð skjótt greitt, og í næsta blaðnum var so tíggjundi punturin, sum øll høvdu sóknast eftir.

Hóast hetta, so vóru tað tó nógv, sum høvdu savnað sær allar puntarnar. Alt í alt táttaði talið av innkomnum brævbjálvum væl upp ímóti teimum túsund, og millum hesar skuldi vinnarin av ferðini so finnast.

### HB-leikari vann

Og nú talan var um eina fótbóltsferð, so mundi tað eisini vera hóskandi, at tað gjørdist ein fótbóltshugaður unglingi, sum fór avstað við vinninginum.

Tað var nevnliga bjálvin hjá 14 ára gamla Martin Johannesen úr Havn, sum kom úr posanum, og hann kann soleiðis longu nú fara at gleða seg til oktober mánað, tá flogfarið til Dublin fer avstað.

Umframt at ganga í skúla á Adventistaskúlanum, er Martin eisini fastur fúsur á dreingjaliðnum hjá HB, so tað er einki at ivast í, at áhugin fyri bóltspælinum er stórur.

Og nú fær hann so møguleika – saman við einum ferðafelaga – at síggja føroyska landsliðið í altjóða dysti á útivølli. Og tað man nú ikki vera so galin fongur.



*Tað varð brævbjálvin hjá 14 ára gamla Martini Johannesen, sum kom fyrstur úr væl fylta posanum*

# Heðin Mouritsen tók steypakappingina

**Talan gjørdist ongantíð um nakra spennandi finalu, tá liðið hjá Heðini Mouritsen í stórum stíli tryggjaði sær steypaheitið fyri 2003**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*



*Talan gjørdist ongantíð um spenning í finaludystinum*

Steypakappinging hjá Føroya Bridgesamband varð leikt um vikuskifti. Átta lið luttóku í kappingini, sum í ár, varð skipað á ein heldur ørvísi hátt. Tey átta liðini vóru býtt sundur í tveir bólkar við fýra liðum í hvørjum.

Bólkur 1
Salamon Johansen, Bogi Simonsen, HH-Bókhald og Eyðun Anthoniussen

Bólkur 2
Heðin Mouritsen, Allan Dal- Christiansen, Jóna Gruntveit og Mortan Rasmussen

Í innleiðandi bólkaspælinum vóru tríggjir dystir á 20 spøl leiktir. Bæði tey ovastu liðini í hvørjum bólki skuldi leika í hálvfinaluni. Nummar eitt í bólki 1, leikti móti nummar tvey í bólki tvey.

Liðini, ið ognaði sær sæti í hálvfinaluni vóru:

Eyðun Anthoniussen — Robert Langaard
Hans Egil Joensen — Edmund Joensen

Heðin Mouritsen — Jóannes Mouritsen
Dánjal Pauli Mohr — Per Kalsberg

Mortan Rasmussen — Einar Ellingsgaard
Finn Ougaard — Høgni Jacobsen

Jens Pauli G. Nolsøe — Jákup Hjaltalin
Høgni Hansen — Kaj Alstrup

Liðið hjá Heðin Mouritsen leikti móti Jens Paula G. Nolsøe í tí einu hávlfinaluni, meðan hin hálvfinalan stóð millum liðini hjá Eyðun Anthoniussen og Mortan Rasmussen.

Heðin Mouritsen vann sín dyst sera sannførandi við ikki færri enn 65 imp móti Jens Paula G. Nolsør, meðan hin dysturin var nakað javnari. Eyðun Anthoniussen vann tó trygt við 21 imp á Mortani Rasmussen.

Finalan gjørdist ikki tann mest spennandi. Liðið hjá Heðin Mouritsen setti seg á dystin frá byrjan og hevði eina trygga leiðslu allan dystin ígjøgnum. Úrsliti gjørdist, at Heðin vann við 39 imp.

Eftir kappingina vóru øll samd um, at broytti steypakappingarhátturin er betur enn tann áður nýtti. Fyrireikarinir finguð stórt rós frá luttakarinum fyri tiltakið, ið uttaniva verður endurtikið.

### Spælið hesaferð

Liðið hjá Boga Simonsen, ið gjørdist Føroyameistari í ár, hevði eina sera vánaliga kapping. Tað byrjaði longu í tí fyrsta spælinum í kappingini, tá ið Bogi og Símin høvdu eina meldu misskiljing.

| Símin | Jórun | Bogi | Johannis |
|---|---|---|---|
| 1kl | 2kl1) | 2rú | pass |
| 3kl | pas | 3hj2) | pass |
| 4rú | A.p. | | |

1)Veik hond við 5-4 í major
2)Hjartara hald, leitar eftir spar haldi til 3sans

K72
2
KB9
EKB1097

D5
DB105
ED832
D5

Sum ein sær, so eru bæði 3 sans og 5 rút í kortunum. Hvussu høvdu tit melda. Er 4rút eitt pos. meld ella sigur makkarin, at hann ikki hevur nakað spar hald og tríggjar lítlar rútarar. Er 3hjart útgangskrav.

## Bestu bridge-liðini

1) Heðin Mouritsen
2) Eyðun Anthoniussen
3) Jens Pauli G. Nolsøe
4) Mortan Rasmussen
5) Salamon Johansen
6) Jóna Gruntveit